# 10,7 milliónir í endurgjaldi til Jógvan S

**Í dag morgun kl. 9.15 byrjaði rættarmálið milum Fiskimálaráðið og Jógvan S. Málið er framhald av einum rættarmáli 30. mars 2004, og í dag skuldi tapið í málinum hjá Jógvan S viðgerast. Jógvan Páll Lassen, advokatur, krevur 10,7 milliónir í endurgjaldi fyri mistar inntøkur hjá Jógvan S**




*Reiðaríið hjá Jógvan Lützen krevur eitt endurgjald uppá 10,7 milliónir krónur*

RÆTTARMÁL
*Rólant Waag Dam*
*rólant@sosialurin.fo*

Í stuttum ber til at siga, at ósemjan í málinum í dag var um, hvussu stórt inntøkutapið hjá Jógvan S hevur verið. Endurgjaldið, sum Jógvan Páll Lassen, advokatur, metir, at reiðaríið hjá Jógvan S hevur rætt til, er onki minni enn 10,7 milliónir krónur.

Hetta grundar hann á ymsar útrokningar, har átta milliónir eru roknaðar sum mistar inntøkur í framtíðini, og hinar 2,7 milliónirnar eru mistar inntøkur í meðan báturin lá.

Framtíðar inntøkumissurin á átta milliónir er roknaður á, at eitt fiskiloyvi er galdandi í 10 ár, og avkastið hjá Jógvan S er sett at vera áttahundraðtúsund krónur. Jógvan S var fyrst lagdur, og síðani vóru eigararnir noyddir at selja bátin. Tískil mistu fingu teir ikki tær inntøkurnar teir høvdu roknað við, og harav kemur stóra endurgjaldskravið.

### Komu í ringt orð

Alt rokilsi um Jógvan S ger, at teir koma í eitt ringt orð. Í miðlunum verður nógv gjørt burtur úr, og tosað verður um, at Jógvan S fer at missa fiskiloyvi – sum teir so eisini gera seinni. Hetta hevur við sær, at manningarliga útskiftingin á bátinum er stór, og teir sum eru umborð byrja at leita eftir øðrum kjansum, og tað ikki lætt at fáa fólk til bátin, nú framtíðin hjá Jógvan S bráddliga ikki sær so bjørt út.

Tá eigararnir keyptu Jógvan S æt skipið Ågot, og var prísurin ein millión krónur. Ågot var í so mikið ringum standi, at neyðugt var við ábótum og umvælingum fyri nakað sum er mett at vera eitt stað ímillum 1,5 og 1,8 milliónir. Men so er tað, at málið um fiskiloyvi verður drigið fram, skipið verður lagt, og seinni selt fyri 5,4 milliónir krónur. Sølan var gjørd, fyri at bjarga reiðaríðnum undan einum húsagangi, og hevur reiðaríið framvegis stóra skuld at dragast við.

### Góðtakur 2,5 milliónir

Sum sagt, so krevur reiðaríið hjá Jógvani S krevur eitt endurgjald uppá 10,7 milliónir, har átta milliónir stava frá mistum framtíðarinntøkum. Tað var Jørgen Niclasen var sum gav fiskiloyvi til Jógvan S. Jacob Vestergaard tók tað síðani aftur, og Bjørn Kalsø sum er landsstýrismaður í Fiskivinnumálum nú, hevur góðtikið eitt endurgjald áljóðandi 2,5 milliónir. Hann kann ikki góðtaka kravið uppá 10,7, tí at hann metir, at reiðaríið hevur fingið mistu framtíðar inntøkurnar aftur við søluni av Jógvan S.

Tá blaðið fór til prentingar í dag, var rættarfundurin ikki liðugur, men dómur fellur í málinum seinni.

Anfinn Kallsberg:

# Vit skulu sláa kalt vatn í blóðið

**Danska stjórnin fer ikki at taka støðu í málinum um at banna troling á djúphøvum, uttan at tað verður í samráð við føroyingar og grønlendingar. Tað hevur danski umhvørvisráðharrin lovað Anfinni Kallsberg, fólkatingsmanni**

TROLING Á DJÚPUM VATNI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Vit skulu sláa kalt vatn blóðið.

Anfinn Kallsberg, fólkatingsmaður sigur, at vit skulu ikki lata fjáltur koma á okkum fyri tað um Green Peace og aðrir umhvørvisfelagsskapir arbeiða fyri at banna troling á djúpum sjógvi í altjóða sjógvi.

Green Peace hevur reist málið sum eitt umhvørvismál og ikki sum eitt vinnumál og endamálið er at banna botntroling í altjóða sjógvi fyri at varðveita tað lívfrøðiliga fjølbroytni.

Annars heldur Anfinn Kallsberg, at málið er farið eitt sindur av sporinumella í hvussu so er verður koyrt í fleiri sporum.

Green Peace hevur reist málið sum eitt umhvørvismál og tað var í umhvørvisnevndini hjá Fólkatinginum at fundur var í morgun um málið.

– Tí er tað eitt sindur misvísandi at tað nú verður upplýst í Útvarpinum, at tað er matvøruráðharrin, sum nú hevur orðað eitt svarskriv, har hann ætlar at boðað frá, at danska stjórnin tekur undir við Green Peace. Samstundis hevur Høgni Hoydal sett matvørumálaráðharranum ein fyrispurning um málið.

Anfinn Kallsberg sigur, at sjálvur hevur hann viðgjørt málið sum eitt umhvørvismál í dag.

– Tí havi eg tosað bæði við formannin í umhvørvisnevndini og við ráðharran í umhvørvismálum, Connie Hedegaard, og greitt teimum frá føroysku støðuni og at vit eru fullkomiliga ósamd við Green Peace.

– Connie Hedegaard skilir væl okkara støðu og hon lovaði mær, at sjálvandi fer danska stjórnin ikki at taka støðu til málið, uttan at tað verður í samráð við føroyskar og danskar myndugleikar, staðfestir Anfinn Kallsberg

– Hon staðfesti eisini, at hon hevur ikki góðkent nakra orðing um, at danska stjórnin tekur undir við Green Peace og hon staðfesti somuleiðis, at hon tekur ikki undir við eini slíkari orðing.

Føroyski fólkatingsmaðurin sigur, at hann greiddi donsku politikarum frá, at innanfyri okkara 200 fjórðinga fiskimark, regulera vit fiskivinnuna og vit hava eisini friðað økið fyri at at bjarga koralrivum á havbotninum.

Í altjóða sjógvi í Norðuratlantshavi hava vit bæði NAFO, NEAFC og aðrar felagsskapir, sum regulera fiskiskapin og tað vildi verið eitt afturstig at blanda ein triðja myndugleika afturat, nevniliga ST, upp í stovnsrøktina í altjóða sjógvi.

Annars staðfestir Anfinn Kallsberg, at frágreiðingarnar, sum Green Peace bygdi síni ynski á, vóru ógvuliga misvísandi á nógvum økjum og prófførslan var ikki serliga sannførandi yvirhøvur.

Annars vísir hann Anfinn Kallsberg á, at eisini landsstýrið arbeiðir við málinum og at tað er rætta mannagongdin.

# Høgni Hoydal vil hava greitt svar frá donsku stjórnini

**Hann vil hava greitt at vita, um danska stjórnin fer at stuðla føroyskum sjónarmiðjum í spurninginum, sum Green Peace hevur reist um at banna botntroling í djúpum sjógvi**

TROLING Á DJÚPUM VATNI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Vil danska stjórnin tryggja, at hon ikki fer at ganga ímóti føroyskum sjónarmiðjum í spurninginum um fullkomið bann fyri botntroling í djúpum sjógvi.

Tað vil Høgni Hoydal, fólkatingsmaður, nú hava eitt greitt svar upp á.

Hann hevur biðið tilskil biðið danska ráðharran fyri føðivøru, Hans Christian Schmidt, um eitt greitt svar uppá, hvørja støðu danska stjórnin hevur til spurningin um at banna djúphavs-botntroling í altjóða sjógvi.

Tað eru Green Peace og aðrir felagsskapir, sum nú vilja hava ST at seta fullkomið bann fyri botntroling í altjóða sjógvi á djúpum vatni.

Í hesum sambandi eru Føroyar og Danmark nevnt sum tvey lond, ið saman við 11 øðrum londum, standa fyri 95% av botntroling á djúpum sjógvi í heimshøvunum og at hetta oyðileggur lívfrøðiliga fjølbroytni í djúphøvunum.

Og í morgun vóru umboð frá Greenpeace á fundi við umhvørvisnevndini hjá danska Fólkatinginum og har royndu tey at fáa danskar politikarar til at at taka undir við einum fullkomnum banni.

Høgni Hoydal sigur, at á fundinum vísti hann á, at kravið frá umhvørvisfelagsskapunum byggir á eina frágreiðing, sum er vísindaliga skeiv og bygd á stórar villur.

Í dag hevur Útvarpið eisini fortalt, at danska stjórnin fer at stuðla krøvunum frá Greenpeace.

Føroyski fólkatingsmaðurin hevur tískil sett danska ráðharranum ein skrivligan fyrispurning í fólkatinginum, har hann vil hava donsku stjórnina at vátta og at tryggja, at hon fer ikki at ganga ímóti føroyskum áhugamálum í hesum máli, hvørki í ES, ST ella øðrum altjóða høpi.

Høgni Hoydal sigur, at frágreiðingin hjá umhvørvisfelagsskapunum kemur til tað merkiligu niðurstøðu, at tað serliga er í Norðuratlantshavi, at havsins fjølbroytni er hótt at djúpvatnstroling.

– Hetta er heilt misvísandi tí teir stóru trupulleikarnir við djúpvatnstroling, eru í Kyrrahavi.

Somuleiðis hevur NEAFC víst á, at frágreiðingin, sum Green Peace og hinir umhvørvisfelagsskapirnir byggja á, er full í villum í sambandi við veiðitølum og í nágreiningini av, hvat djúphavs-fiskivinna er og tí er niðurstøðan púra skeiv.

Tað er eisini staðfest, at frágreiðingin, sum Greenpeace hongir seg í, vísir ongastaðni, at samanhangur er ímillum trolfiskiskap og havsins fjølbroytni á havbotninum.

Tað er kortini ávíst, at troling ávirkar, serliga korallir á botninum, men enn vísa ongi tøl, hvussu stórur partur av korallunum eru komin í sambandi við troling.

Høgni Hoydal vísir eisini á, at higartil hevur danska støðan verið heldur ógreið, men at danir eru sinnaðir at stuðla Greenpeace, hóast danska stjórnin veit, at ES fer ikki at taka undir við Greenpeace, tí Spania og Portugal fara at gera veto í hesm máli. Tí kann Danmark spæla fríspæl í ES, men so verður tað torført at taka eina aðra støðu í ST ella NEAFC.

Tí vil Høgni Hoydal nú hava eina greiða fráboðan um støðuna hjá donsku stjórnini í hesum máli.